# Guðs Einfalda Frelsuætlan

*Vinur mín:* Eg spyrji teg hin týdningarmesta spurning lívs tíns. **Gleði tín ella sorg tín í allar ævir avhongur av svari tínum.** Spurningurin er: **ERT TÚ FRELSTUR?** Tað er ikki ein spurningur um hvussu góður tú ert, ella um tú ert kirkjulimur, men **ERT TÚ FRELSTUR? Ert tú vísur í, at tú fert til himmals, tá ið tú doyrt?**

Guð sigur, at fyri at fara til himmals, mást tú vera endurføddur. Í Jóhannes 3:7 segði Jesus við Nicodemus, Tit mega verða endurføddir.

Í Bíbliuni gevur Guð okkum ætlan sína fyri *hvussu ein kann verða endurføddur,* sum merkir *at verða frelstur.* Ætlan hansara er einføld! Tú kanst verða **frelstur** í dag. Men hvussu?

Fyrst, vinur mín, mást tú innsíggja, at **tú ert ein syndari.** Tí allir hava syndað, og *eru* komnir til korts av dýrd Guðs; (Rom 3:23. FKJ).

Av tí at tú ert ein syndari, **ert tú dómfeldur til at doyggja.** Tí lønin hjá synd er deyði; (Rom 6:23. FKJ). Hetta inniheldur æviga glatan í helviti.

Og eins og tað er fyriskipað monnum eina ferð at doyggja, men eftir hetta *er* dómurin: (Hebr. 9:27. FKJ)

Men Guð elskaði teg so nógv, at **hann gav eingitna Son sín, Jesus, at bera synd tína og doyggja í títt stað.** Tí hann hevur gjørt hann **at vera synd fyri okkum,** hvønn onga synd kendi; at vit máttu verða gjørdir rættvísi Guðs í honum. (II. Cor. 5:21. FKJ).

Jesus mátti úthella blóð sítt og doyggja. Tí lív kjøtsins *er* í blóðinum: (Leviticus 17:11. FKJ). Og uttan úthelling av blóði er eingin eftirgeving. (Hebr. 9:22. FKJ).

Men Guð viðmælir kærleika sínum mótvegis okkum, í *tí* at, meðan vit vóru enn syndarar, **Christus doyði fyri okkum.** (Rom. 5:8. FKJ).

Hóast vit kunnu ikki skilja hvussu, so segði Guð, at syndir mínar og syndir tínar vórðu lagdar uppá Jesus og hann doyði í okkara stað. Hann gjørdist okkara ístaðgangil. Tað er satt. Guð kann ikki ljúgva.

Vinur mín, Guð ... býður øllum monnum allar staðir at **venda um:** (Gern. Ap. 17:30. FKJ). **Henda umvending** er ein broyting av sinni sum verður einugt við Guði at ein er ein syndari, og eisini verður einugt við tað, sum Jesus gjørdi fyri okkum á krossinum.

Í Gern. Ap. 16:30-31, spurdi Philippiski fongsulsvørðurin Paulus og Silas, Harrar, hvat má **eg gera at verða frelstur?** Og teir søgdu, **Trúgv á Harran Jesus Christ, og tú skalt verða frelstur ...**

Einfaldliga trúgv á hann, sum hann ið bar synd tína, doyði í títt stað, varð jarðaður, og hvønn Guð reisti upp aftur. Uppreisn hansara forvissar kraftigani, at hin trúgvandi kann leggja hald á ævigt-varandi lív, tá ið Jesus Christus er móttikin sum Frelsari.

Men so mongum sum tóku ímóti honum, til teirra gav hann mátt at gerast synir Guðs, *enntá* til teirra sum trúgva á navn hansara:" (Jóh. 1:12. FKJ).

Tí **hvørsumhelst** skal kalla uppá navn Harrans **skal verða frelstur.** (Rom. 10:13. FKJ).

***Hvørsumhelst*** íroknar teg. ***Skal verða frelstur*** merkir ikki kanska, ella kann, **men *skal verða frelstur.***

Vissuliga innsært tú, at tú ert ein syndari. Beint nú, hvarsumhelst tú ert, sum tú vendir um, lyft hjarta títt til Guðs í bøn.

Í Lukas 18:13 bað syndarin: Guð veri náðigur móti mær einum syndara. Bið bara: ***Á Guð, eg veit, at eg eri ein syndari. Eg trúgvi, at Jesus Christus var mín ístaðgangil, tá ið hann doyði á krossinum. Eg trúgvi, at hansara úthelta blóð, deyði, jarðan, og uppreisn vóru fyri meg. Nú taki eg ímóti honum sum mínum Frelsara. Eg takki tær fyri fyrigevingina av syndum mínum, frelsu-gávuna og ævigt-varandi lív, vegna miskunnsomu náði tína. Amen.***

**Bara tak Guð uppá hansara orð** og legg hald á hansara frelsu við trúgv. **Trúgv, og tú vilt verða frelstur.** Eingin kirkja, eingin felagskapur, einkið sakramenti, og eingi góð verk kunnu frelsa teg. **Minst til, Guð**

**útførir frelsingina. Alla sum hon er!**

**Einfalda frelsuætlan Guðs er: Tú ert ein syndari.** Tessvegna, uttan tú trýrt á Jesus, sum doyði í títt stað, vilt tú brúka ævinleikan í helviti. Um tú trýrt á hann sum tín krossfesta, jarðaða, og risna Frelsara, móttekur tú fyrigeving fyri allar syndir tínar og **gávu hansara av ævigari frelsu við trúgv.**

Tú sigur, Vissuliga kann tað ikki vera so einfalt. Jú, tað er einfalt! Tað er sambært skriftini. Tað er ætlan Guðs. **Vinur mín, trúgv á Jesus og móttak hann sum Frelsara í dag.**

Um ætlan hansara er ikki fullkomiliga klár fyri tær, **so les hesa traktat umaftur og umaftur, uttan at leggja hana niður, inntil tú skilur tað.** Sál tín er verd meir enn heili heimurin.

Tí hvat skal tað gagna einum manni, um hann skal vinna heila heimin, **og missa egnu sál sína?** (Mark 8:36. FKJ).

Ver vissur um, at tú ert frelstur. Um tú missir sál tína, missir tú himinin og missir alt. Góði tú, lat Guð frelsa teg júst hesa løtu.

**Kraft Guðs vil frelsa teg, varðveita teg frelstan, og gera teg føran fyri** at liva eitt sigrandi <u>ch</u>ristinlív. Tað hevur eingin freisting tikið tykkum uttan slík sum er vanlig hjá manni: men Guð *er* trúfastur, hvør vil ikki loyva tykkum at verða freistaðar uppum tað tit eru mentir; men vil við freistingini eisini gera ein veg at komast undan, at tit mega vera mentir at bera tað. (I. Cor. 10:13. FKJ).

Lít ikki á kenslur tínar. Tær broytast. Statt á lyftum Guðs. Tey broytast aldri. Eftir at tú ert frelstur, eru tað trý ting, tú mást íðka dagliga fyri andaligan vøkstur:

- **Bið** - tú talar við Guð
- **Les Bíbliu tína** - Guð talar við teg
- **Vitna** - tú talar fyri Guð

**Tú eigur at verða doyptur** í lýdni yvirfyri Harranum Jesus Christi **sum ein almennan vitnisburður um frelsu tína**, og so sameinast at eini Bíbliu-trúgvandi kirkju uttan drál.

Skammast tú tí ikki við vitnisburðin um váran Harra ... (II. Tim. 1:8. FKJ).

Hvørsumhelst *ið* tí skal játta meg frammi fyri monnum, hann vil eg játta eisini frammi fyri Faðir mínum sum er í himni. (Matt. 10:32. FKJ).

Copyright: Lifegate Inc., 2007